# Ársroknskapur 2008

## Årsberetning 2008

TRYGD

hugsar um teg.

# Innihaldsyvirlit / Indholdsfortegnelse


| | |
|---|---|
| **Leiðslufrágreiðing** | **3** |
| **Ledelsesberetning** | **6** |
| **Nýttur roknskaparháttur** | **9** |
| **Anvendt regnskabspraksis** | **10** |
| **Gongdin seinastu 5 árini** | **11** |
| **Udviklingen over 5 år** | **11** |
| **Rakstrarúrslit** | **12** |
| **Resultatopgørelse** | **12** |
| **Fíggjarstøða pr. 31. desember** | **13** |
| **Balance pr. 31. december** | **13** |
| **Viðmerkingar til ársroknskapin** | **14** |
| **Noter til årsregnskabet** | **14** |
| **Átekning** | **17** |
| **Påtegninger** | **17** |
| **Grannskoðaraátekningar** | **18** |
| **Revisionspåtegninger** | **18** |



**P/F TRYGD**
Gongin 7
Postboks 44
FO 110 Tórshavn
Tlf. +298 358100
Fax +298 317211

E-mail: trygd@trygd.fo
www.trygd.fo

Pf.skr.nr.8, Tórshavn
V-tal nr. 324.086

# Leiðslufrágreiðing

## Ársfrágreiðing 2008
2008 var eitt hendingaríkt ár hjá TRYGD. Ringa veðrið fyrsta ársfjórðing hevði nógv skaðaendurgjøld við sær og harvið eitt høgt skaðaprosent.

Øktir rakstrarkostnaðir seinastu árini høvdu við sær, at neyðugt var við tillagingum innan rakstur felagsins. Umframt hetta, førdi ein staðfesting av, at skipatryggingarnar ikki kastaðu nóg nógv av sær til, at hesar ikki vóru endurnýggjaðar í 2009.

TRYGD er elsta tryggingarfelag í Føroyum. Einkarrættur á føroyska tryggingarmarknaðinum frá 1940 til 1997, gjørdi umstøðurnar truplar fyri felagið, men síðani 1. februar 1998 hevur TRYGD aftur havt møguleika fyri at tekna tryggingar í Føroyum, og harvið tryggja kapping á føroyska skaðatryggingarmarknaðinum.

1. septembur 2008 bleiv nýggj lóg um tryggingarvirksemi sett í gildi í Føroyum. Nýggja lógin, ið er bygd á donsku lógina um fíggjarliga vinnu, gevur føroyska marknaðinum eitt breiðari grundarlag, og ger tað møguligt hjá útlendskum tryggingarfeløgum at koma til Føroya.

Nýggja løggávan harmoniserar fyritreytirnar hjá føroysku feløgunum við tær hjá feløgum í ES, men hon hevur eisini fleiri umsitingarlig krøv við sær. TRYGD gleðist um nýggju løggávuna, ið yvir tíð fer at gagna føroyska tryggingarmarknaðinum.

## Marknaðurin
Føroyski tryggingarmarknaðurin er í støðugari broyting. Kappingin er hørð millum feløgini, bæði hvat prísi og tænastum viðvíkur. Tó er fatanin tann, at tað ikki hendu stórvegis broytingar í marknaðarluti millum feløgini bæði í 2008.

Nýggja tryggingarløggávan gevur útlendskum tryggingarfeløgum møguleika til at koma á føroyska marknaðin. Hetta er tó treytað av, at politiska skipanin ger avtalur við tey lond talan er um, sum gera tað møguligt hjá feløgum at reka tryggingarvirksemi í londunum hjá hvør øðrum. Higartil hevur landstýrið einans gjørt avtalu við Ísland hesum viðvíkjandi.

Í 2001 byrjaði TRYGD við sjóvátryggingum til størri skip. Menningin á hesum øki hevur ikki verið nøktandi orsakað av ov lágum prísum og manglandi eftirspurningi. Av tí sama, hevur hetta økið ikki kastað nóg nógv av sær, tá hugsað verður um, hvussu stórur váðin er. Tí valdi TRYGD ikki at endurnýggja sjóvátryggingarnar til størri skip í 2009. Ein nýggjur luttakari á føroyska tryggingarmarknaðinum tryggjaði tó, at einkarrættur ikki er á sjóvátryggingarøkinum.

Nýggja løggávan forðar ikki longur føroyskum tryggingartakarum at tekna skaðatryggingar beinleiðis hjá útlendskum feløgum.

Sum nakað nýtt, ber nú til hjá tryggingarmeklarum at søkja um góðkenning til meklaravirksemi í Føroyum. Hetta er eitt framstig og kann vera við til at menna marknaðin.

## Lógin
Í sambandi við at nýggja lógin um tryggingarvirksemi bleiv sett í gildi 1. septembur 2008, eru fleiri kunngerðir og vegleiðingar settar í gildi við virknaði frá 1. januar 2009. Hesar svara stórt sæð til tær, sum eru galdandi á danska tryggingarmarknaðinum.

Myndugleikarnir hava valt at geva føroysku tryggingarfeløgunum eina umskiftisskipan til ávísar kunngerðir, millum annað fráboðan av individuellum gjaldføristørvi, sum ikki verður sett í gildi fyrr enn roknskaparárið 2010.

Enn mangla nakrar kunngerðir, sum væntandi verða almannakunngjørdar á vári 2009.

1. juli 2008 varð Endurgjaldsábyrgdarlógin sett í gildið. Bíðað hevur verið í spenningi eftir lógini, tí hon tryggjar persónum munandi betri endurgjald fyri persónskaðar, sum annar kann ábyrgdast fyri.

Í flestu førum koma tryggingarfeløgini at veita persónsskaðaendurgjøldini eftir ábyrgdartryggingunum. Orsakað av broyttu umstøðunum, valdi TRYGD at tillaga prísin á ábyrgdartryggingunum við virknaði frá 1. desembur 2008. Ábyrgdartryggingarnar hækkaðu við uml. 35 – 50 %. Fyri ein privatkunda, ið hevur tryggjað bil, hús og innbúgv, merkti hækkanin ein meirkostnað á uml. 1.000 kr. tilsamans í árligum tryggingargjaldi.

TRYGD metir at hækkanin svarar til økta váðan. Av tí at hagtalsliga grundarlagið í Føroyum ikki er so gott, eru tøl fyri persónskaðar frá serliga Danmark nýtt sum grundarlag fyri útrokningunum.

Nýggja Endurgjaldsábyrgdarlógin hevur við sær, at tørvur er á broyting av reglunum um arbeiðsskaða. Hetta orsakað av sera stóra muninum í endurgjaldi fyri persónskaða, um hesin verður viðgjørdur eftir ávíkavist Endurgjaldsábyrgdarlógini ella núverandi lóg um arbeiðsskaða.

Landsstýrið hevur í longri tíð arbeitt við eini nýggjari Arbeiðsskaðalóg og hevur hendan verið til hoyringar fleiri ferðir. Tó er lógin ikki komin til viðgerðar í løgtinginum enn.

TRYGD vónar at neyðugu broytingarnar í Arbeiðsskaðalógini vera framdar í 2009.

## Tryggingargjøld
Brutto inntøkan av tryggingargjøldum vaks við 9,1 mió. kr. í 2008 til 90,7 mió. kr. samanlagt. Hetta svarar til ein vøkstur á 11,2 %. Økingin skyldast bæði meirsølu og einari prístillaging, ið kom í gildi heystið 2008.

TRYGD rindaði samanlagt 12,3 mió.kr. brutto í endurtryggingargjøldum í 2008, mótvegis 13,4 mió.kr. í 2007.

Inntøkurnar av tryggingargjøldunum fyri egna rokning vuksu við 8,9 mió.kr. til 74,1 mió.kr. í 2008.

Brutto inntøkurnar av skipatryggingum vóru í 2008 uml. 8,9 mió.kr. Av hesum var endurtryggingargjaldið 6,7 mió.kr. Hetta økið verður ikki varveitt í 2009.

## Skaðagongdin

Skaðaútreiðslurnar vóru høgar í 2008 í mun til undanfarin ár. Samanlagt vóru skaðaútreiðslurnar fyri egna rokning 50,3 mió.kr. í 2008, samanborið við 36,1 mió.kr. í 2007.

Stóra økingin á næstan 40 % stóðst av nógvu skaðunum í 1.ársfjórðingi 2008, tá fleiri ódnir vóru.

Nakrir stórir skaðar innan flutning og vinnubygningar høvdu eisini sína ávirkan á gongdina í 2008. Samanlagt var skaðaprosentið fyri 1. ársfjóðring 2008 yvir 100, og var tað tá hildið at vera órógvandi.

Í 2008 var skaðaprosentið fyri privat sethús 62, samanborið við 56 í 2007. Eisini fyri privatu bilarnar var skaðaprosentið nógv hægri í 2008 enn í 2007. Gongdin er ikki nøktandi, men stavar eitt nú frá ringa veðrinum í 1. ársfjórðingi, og nógv hækkaðum umvælingarkostnaðum.

Innan sjóvátryggingarnar hava tað, umframt áður nevnda flutningsskaða, verið nakrir størri skaðar á skip, ið hava borið við land, skaðar á motorar, sleip og einstakir stormskaðar. Samlaða úrslitið fyri sjóvátryggingarnar var ikki nøktandi.

Bruttoskaðaendurgjøldini í 2008 vóru 55,8 mió.kr., og felagið fekk samanlagt 9,8 mió.kr. frá endurtryggjarunum. Í 2007 vóru bruttoskaðaendurgjøldini 46,3 mió.kr., og 4,2 mió.kr. vórðu móttiknar frá endurtryggjarunum.

Skaðaprosentið fyri egna rokning var 68 í 2008, samanborið við 55 í 2007.

Endurgjaldsburturleggingarnar fyri egna rokning vóru 20,6 mió.kr. við ársenda 2008. Hetta er ein øking á 4,2 mió.kr., samanborið við 2007. Økingin stendst av skjótt vaksandi skaðaendurgjøldunum í 2008, har tað lutfalsliga eru fleiri skaðar í 2008, sum ikki vóru avgreiddir áðrenn ársskiftið, samanborið við undanfarna ár.

Við høga skaðaprosentinum í 1, ársfjórðingi kundi TRYGD ásanna, at skaðaútreiðslurnar pr. skaða vóru hækkaðar nógv meira enn árliga prístalsjavningin tók hædd fyri. Hetta hevði við sær, at TRYGD valdi at gera eina prístillaging á 5 – 15 % á teimum tryggingum, har skaðaumvæling krevur, at tilfar o.a. verður keypt í samfelagnum. Hetta var serliga galdandi fyri bilar, sethús og vinnubygningar. Prístillagingin fekk virknað frá høvuðsforfalli á einstøku tryggingunum, og fær sostatt fullan virknað við árslok 2009.

## Endurtrygging

TRYGD hevur broytt endurtryggingarnar nakað í 2009. Hægst ásetti váðin fyri einstakan skaða er minkaður í mun til undanfarin ár. Samstundis eru skipatryggingarnar vekk, har størsti parturin var endurtryggjaður. Hetta merkir, at váðin hjá felagnum mótvegis endurtryggjarum er minkaður.

Aðrir katastrofufulnaðir, so sum storm og stórbruni, halda áfram sum áður. Harumframt halda endurtryggingarnar á sjóvátryggingunum áfram, hvat flutningi viðvíkur.

## Tryggingartekniskt úrslit

Tryggingartekniska úrslitið fyri 2008 var 7,2 mió.kr. í mun til 4,2 mió.kr. í 2007. Harvið betraði TRYGD um tryggingartekniska úrslitið við 3 mió.kr. í 2008 samanborið við 2007.

Úrslitið stavaði serliga frá týðandi minkingum í rakstrarútreiðslunum. Rakstrarútreiðslurnar eru sum heild minkaðar úr 26,8 mió.kr. til 18,9 mió.kr. Beinleiðis fyrisitingarligu kostnaðirnir eru minkaðir við 6,7 mió.kr. harav niðurskurðir í lønarútreiðslum eru 3,7 mió.kr.

Betranin stendst eisini av øktum tryggingargjøldum fyri egna rokning áljóðandi 8,9 mió.kr. samanborið við 2007, sum ávikavist stavar frá meirsølu og prístillagingini, ið fekk virkna frá heystinum 2008.

Tryggingartekniska úrslitið verður mett at vera nøktandi, tá hædd verður tikin fyri einum vánaligum skaðaári í 2008, har skaðaútreiðslurnar fyri egna rokning eru øktar við 14,2 mió.kr. í mun til 2007.

## Gongdin í felagnum

Í 2008 hevur miðvíst verið arbeitt mótvegis at skapa eina kappingarføra tryggingarfyritøku.
Umfatandi kostnaðartillagingar eru framdar, samstundis sum vinnuøki, ið ikki hava kastað nóg nógv av sær, eru niðurløgd.

Fyrisitingarligar broytingar eru eisini gjørdar, samstundis sum leiðslan í felagnum er umskipað.

Leiðslan metir TRYGD at hava eina góða støðu á føroyska tryggingarmarknaðinum.

Innanhýsis stendur felagið fyri stórum avbjóðingum orsakað av nýggjum lógarbroytingum, men nýggjar mannagongdir og víðari menning av KT-skipanum eru eisini til frama hjá kundunum. TRYGD væntar at skipa roknskapin eftir IFRS skipanini í 2009 og fer tí at síggjast beinleiðis aftur í samtaksroknskapinum hjá móður-felagnum frá 1. ársfjóðringi 2009.

Í 2008 vóru í miðal 27 heiltíðarstarvsfólk hjá TRYGD samanborið við 31 í 2007. Eisini kann nevnast, at við árslok 2008 vóru 21 heiltíðarstarvsfólk í felagnum, og vísir hetta leypandi tillagingina, ið er framd á økinum í 2008.

## Ársúrslit

TRYGD hevði í 2008 eitt yvirskot áljóðandi 11,5 mió.kr. áðrenn skatt. Ársúrslitið eftir skatt er 9,4 mió.kr.,

samanborið við 6,9 mió.kr., ella eini øking á 2,5 mió.kr., í 2007.

Samanlagt hevur TRYGD rentað eginognina við uml. 11 % í 2008.

Leiðslan metir úrslitið at vera nøktandi. Framdu tillagingarnar við lægri rakstrarkostnaði, hava saman við eini øking í tryggingargjøldunum, vigað upp ímóti stóru skaðaútreiðslunum í 2008.

Fíggjarinntøkurnar í 2008 vóru 6,5 mió.kr. í mun til 6,1 mió.kr. í 2007. Fyri tað mesta ger felagið brúk av lánsbrøvum og ikki virðisbrøvum. Hetta hevur víst seg at vera ein fyrimunur í einum virðisbrævamarknaði í fríum falli í 2008, har TRYGD hevur havt javnar fíggjarligar inntøkur.

Skatturin av ársúrslitinum í 2008 varð 2,1 mió.kr.

## Ársavlop

Nevndin skjýtur upp, at 24 mió.kr. verða goldnar út í vinningsbýti til partaeigaran, P/F Føroya Banka.

Umframt ársyvirskotið á 9,4 mió.kr, útlutar TRYGD sostatt eisini 14,6 mió.kr. av fríum reservum.

## Eginogn felagsins

Við árslok 2008 var eginognin 70,7 mió.kr., eftir at 24,0 mió.kr. eru settar av til vinningsbýti. Føroya Banki eigur allan partapeningin á 40 mió kr.

Tiltaksgrunnurin áljóðandi 45 mió.kr. við ársenda 2007, er umgjørdur til fríar reservur í 2008. Hetta er gjørt við heimild í partafelagslógini, sum varð broytt í 2008.

## Útlit fyri 2009

Leiðslan væntar eitt avbjóðandi ár, uttan serligan vøkstur í marknaðinum fyri tryggingar.
Samfelagsútlitini tykjast ikki so bjørt, og ein møgulig øking í tryggingarinntøkunum skal tryggjast við tænastu-menning og øking í marknaðarluti.

Leiðslan væntar, at inntøkurnar í 2009 vera umleið tær somu sum í 2008. Inntøkurnar frá skipatryggingunum eru burtur, men roknað verður við økingum frá øðrum tænastum, eisini orsakað av prístillagingunum, ið framdar eru.

Óvist er, hvussu verður við nýggjum tryggingarfeløgum á føroyska marknaðinum í komandi ári, havandi samfelagsgongdina í huga. Men harða kappingin millum verandi feløg, bæði tá talan er um útboð og prís, væntast at halda áfram.

TRYGD arbeiðir miðvíst við at betra um rentingina av eginognini. Grundað á at tryggingarligi váðin fyri egna rokning í felagnum er minkaður, samstundis sum felagið er blivið meiri lønandi, hevur nevndin gjørt av, at fyri at fáa eina meiri hóskandi eginogn, skal felagið útluta 24 mió.kr. samanlagt í vinningsbýti fyri 2008. Ein eginogn áljóðandi 70,7 mió.kr. við ársenda 2008, verður mett at vera nøktandi fyri virksemið hjá TRYGD í 2009.

# Ledelsesberetning

## Ledelsesberetning 2008

Året 2008 har været et udfordrende år for TRYGD. Dårligt vejr i 1. kvartal medførte et højt skadesprocent, og deraf afledte høje skadesomkostninger.

Stigende driftsomkostninger de senere år har nødvendiggjort rationaliseringer af selskabets drift, og en konstatering af utilfredsstillende lønsomhed af de marine skibsforsikringer har medført, at disse ikke er blevet fornyet for 2009.

TRYGD er Færøernes ældste forsikringsselskab. Et forsikringsmonopol gældende fra 1940 til 1997 gav selskabet svære betingelser, men efter 1. februar 1998 har TRYGD igen haft mulighed for at tegne forsikringer på Færøerne, og derved sikret konkurrence på det færøske skadesforsikringsmarked.

Den 1. september 2008 blev ny lov om forsikringsvirksomhed sat i kraft på Færøerne. Den nye lovgivning, der er baseret på den danske lov om finansiel virksomhed, giver yderligere muligheder for at det færøske forsikringsmarked får et bredere fundament, og skaber mulighed for at åbne markedet for udenlandske udbydere.

Den nye lovgivning harmoniserer driftsforudsætningerne hos de færøske selskaber med selskaber i andre EU-lande, men medfører samtidig øgede administrative krav. TRYGD hilser lovgivningen, der på sigt vil gavne den videre udvikling af det færøske forsikringsmarked, velkommen.

## Markedet

Forsikringsmarkedet på Færøerne er i fortsat udvikling. Der er rimelig stor konkurrence mellem udbyderne – både på pris og produktudbud, men det er dog vores indtryk, at der ikke er sket væsentlige forskydninger i markedsandelene mellem udbyderne i 2008.

Den nye lov om forsikringsvirksomhed giver mulighed for at udenlandske forsikringsselskaber kan etablere sig på Færøerne. Dog forudsætter det at de politiske myndigheder indgår aftaler med de respektive lande, om gensidig mulighed for at etablere forsikringsvirksomhed i hinandens lande. Hidtil har det færøske landstyre kun indgået en sådan aftale med Island.

TRYGD startede i 2001 at udbyde marine forsikringer til større skibe. Udviklingen i denne portefølje har ikke været tilfredsstillende grundet et lavt prisniveau, og utilstrækkelig efterspørgsel. Lønsomheden af dette forretningsområde var ikke tilfredsstillende i forhold til risikoen. TRYGD har derfor valgt ikke at forny skibsforsikringerne for 2009. En ny entré fra et udenlandsk forsikringsselskab har dog sikret, at der ikke opstod monopoludbud af skibsforsikringer på Færøerne.

Den nye lovgivning forhindrer ikke længere færøske forsikringstagere at tegne skadesforsikringer direkte hos forsikringsselskaber i udlandet.

Som en nyhed er der også hjemlet forsikringsmæglere at søge om godkendelse at drive mæglervirksomhed på Færøerne. Dette er et fremskridt, og kan være med til at udvikle markedet yderligere.

## Lovgivningen

I forbindelse med at lov om forsikringsvirksomhed er trådt i kraft den 1. september 2008, er der med virkning fra 1. januar 2009 sat i kraft en række bekendtgørelser og vejledninger. Disse bekendtgørelser svarer stort set til dem der er gældende på det danske forsikringsmarked.

Myndighederne har valgt at give de færøske forsikringsselskaber en overgangsordning på enkelte bekendtgørelser, hvoriblandt indberetning af individuel solvens først iværksættes fra regnskabsåret 2010.

Endnu mangler enkelte bekendtgørelser, der forventes offentliggjort i foråret i 2009.

Den 1. juli 2008 blev der vedtaget anordning om Erstatningsansvarsloven. En længe tiltrængt opdatering af dette lovområde, som stiller personer økonomisk meget bedre i tilfælde af personskade, hvor der kan rejses erstatningskrav.

I de fleste tilfælde vil forsikringsselskaberne blive afkrævet personskadeserstatninger under de almindelige ansvarsforsikringer. Grundet disse ændrede forudsætninger for ansvarsforsikringer, har TRYGD valgt at gennemføre en forhøjelse af præmierne for de berørte ansvarsforsikringer. Prisforhøjelsen fik virkning fra 1. december 2008. Ansvarspræmierne er forhøjede i niveauet 35-50 %. For en privatkunde med bil-, hus- og indboforsikring, betyder prisforhøjelsen at den samlede forsikringspræmie er steget med i snit kr. 1000 om året som følge af den nye Erstatningsansvarslov.

TRYGD anser denne prisforhøjelse som dækkende for de nye forpligtelser. Dog er der meget beskedent statistisk grundlag på Færøerne at tage udgangspunkt i til beregningerne, hvorfor tal for personskade fra især Danmark er anvendt som beregningsgrundlag.

Den nye Erstatningsansvarslov efterlader en åbenbar nødvendig opdatering af reglerne for arbejdsskade. Dette fordi der nu er meget stor forskel på skadeserstatningerne for personskade, såfremt disse behandles efter regler i Erstatningsansvarsloven eller nugældende regler om arbejdsskader. Landsstyret har gennem en årrække arbejdet med et forslag til ny Arbejdsskadelov, og denne har været til høring ad flere omgange. Men denne lov er endnu ikke kommet i Lagtinget til behandling.

TRYGD håber at denne opdatering og harmonisering af reglerne for personerstatning vil blive gennemført i 2009.

## Præmieindtægter

Bruttopræmieindtægterne øgedes med 9,1 mio.kr. i 2008, til i alt 90,7 mio.kr. Dette svarer til en vækst på 11,2 %. Væksten skyldes delvis mersalg, og delvis en

prisregulering, der blev gennemført hen over efteråret 2008.

TRYGD betalte i alt 12,3 mio.kr. i genforsikringspræmier brutto i 2008, i forhold til 13,4 mio.kr. i 2007.

Præmieindtægter for egen regning øgedes med 8,9 mio.kr., til 74,1 mio.kr. i 2008.

Bruttopræmierne fra skibsforsikringer var i 2008 omkring 8,9 mio.kr., og genforsikringspræmien heraf var omkring 6,7 mio.kr. Tilsvarende indtægt og forpligtelse vil ikke være i året 2009.

## Skadesforløbet

Skadeserstatningsudgifterne i 2008 var høje i forhold til foregående år. Samlet udgjorde skadeserstatningsudgifterne for egen regning 50,3 mio.kr. i 2008, i forhold til 36,1 mio.kr. i 2007. Den betydelige stigning, på næsten 40 %, skyldes især mange skader i 1. kvartal 2008, hvor der var flere orkaner.

Et par større enkeltskader, indenfor varetransport og en brand i en erhvervsejendom, har også forværret skadesudviklingen i 2008. Samlet set, var skadesprocenten for 1. kvartal 2008 over 100, hvilket på det tidspunkt var bekymrende.

For private parcelhuse var skadesprocenten i 2008 62 % i forhold til 56 % i 2007. Også for de private bilforsikringer, var skadesprocenten væsentlig højere i 2008 i forhold til 2007. Denne udvikling er ikke helt tilfredsstillende, men skyldes i til dels det dårlige vejr i 1. kvartal, og markant forhøjede reparationsomkostninger.

På Marineområdet har der, ud over nævnte varetransportskade, været nogle større skader på skibe med land-påsejlinger, skader på motorer, bugsering og enkelte stormskader. Det samlede resultat for marineforsikringer var ikke tilfredsstillende.

Bruttoskadeserstatningerne udgjorde 55,8 mio.kr. i 2008, og selskabet modtog i alt 9,8 mio.kr. i genforsikringsdækning. Tilsvarende var bruttoskadeserstatningerne i 2007 46,3 mio.kr., hvor genforsikringsdækningen var 4,2 mio.kr.

Skadesprocenten for egen regning udgjorde i 2008 således 68 % i forhold til 55 % i 2007.

Erstatningshensættelserne for egen regning udgør 20,6 mio.kr. ultimo 2008. Dette er en stigning på 4,2 mio.kr. i forhold til 2007. Stigningen er afledt af de kraftig øgede skadeserstatninger i 2008, hvor der er forholdsvis flere skader i 2008, der endnu ikke er afklaret ved årsskiftet i forhold til situationen i 2007.

TRYGD kunne med en høj skadesprocent i 1. kvartal konstatere, at skadesudgifterne pr. enkeltskade var steget betydelig mere end den årlige indeksering. Dette medførte, at TRYGD valgte at gennemføre en ekstraordinær prisforhøjelse på mellem 5-15 % på de forsikringstyper, hvor skaderne skal erstattes med ydelser, der indkøbes i samfundet. Dette var især for automobiler, parcelhuse og erhvervsejendomme. Pristilpasningen gennemføres med virkning fra hovedforfald på de enkelte forsikringer, og får således fuld effekt ved udgangen af 2009.

## Reassurance

TRYGD har ændret noget på sit reassuranceprogram for 2009. Den maksimale fakultative risiko per skadesbegivenhed er reduceret i forhold til tidligere år. Samtidig er skibsforsikringerne udgået af forsikringsporteføljen, hvor størstedelen var afdækket af reassurancer. Dette betyder samtidig, at selskabets risiko på reassurandører er reduceret.

Øvrige katastrofedækninger, blandt andet storm og storbrand, fortsætter uforandret. Desuden fortsætter det marine område i form af varetransport, hvor der er reassurance på alle væsentlige kontrakter.

## Forsikringsteknisk resultat

Det forsikringstekniske resultat blev 7,2 mio.kr. i 2008 i forhold til 4,2 mio.kr. i 2007. TRYGD forbedrede dermed sit forsikringstekniske resultat i 2008 med 3,0 mio.kr. i forhold til 2007.

Resultatforbedringen skyldes primært en kraftig reduktion af driftsomkostningerne. Driftsomkostningerne er i sin helhed reduceret fra 26,8 mio.kr. til 18,9 mio.kr. De direkte administrationsomkostninger er reduceret 6,7 mio.kr., hvoraf besparelser i lønomkostninger udgør 3,7 mio.kr.

Forbedringen kommer også fra øgede præmieindtægter for egen regning på 8,9 mio.kr. i forhold til 2007, hvilket dels er afledt af mersalg, og dels af de prisændringer, der er gennemført i efteråret 2008.

Det forsikringstekniske resultat anses som tilfredsstillende, når der samtidig tages hensyn til et dårligt skadesår i 2008, hvor skadesomkostninger for egen regning er øget 14,2 mio.kr. i forhold til 2007.

## Selskabets udvikling

Der har gennem året 2008 været arbejdet målrettet med at skabe en konkurrencedygtig forsikringsvirksomhed. Der er gennemført kraftige omkostningstilpasninger, og enkelte forretningsområder, der ikke har vist sig lønsomme, er nedlagte.

Der er foretaget organisationsændringer, herunder ændringer i ledergruppen. Ledelsen anser TRYGD for at have en god forretningsmæssig position på det færøske forsikringsmarked.

Internt står selskabet overfor store udfordringer med de nye lovændringer, men nye forretningsgange og videreudvikling af IT-systemet gavner også TRYGD´s kunder på sigt. TRYGD forventes at aflægge regnskabet efter IFRS i 2009, og vil indgå direkte i moderselskabets koncernregnskab fra 1. kvartal 2009.

I 2008 var der gennemsnitlig 27 heltidsansatte i TRYGD i forhold til 31 i 2007. Det kan tilføjes, at der ved udgangen af 2008 var 21 fastansatte i selskabet, hvilket afspejler den løbende rationalisering, der er foretaget gennem året 2008.

## Årets resultat

TRYGD havde i 2008 et overskud på 11,5 mio.kr. før skat. Resultatet i 2007 var tilsvarende 8,4 mio.kr. før skat. Årsresultatet efter skat er 9,4 mio.kr. i 2008, mod 6,9 mio.kr., eller en forbedring på 2,5 mio.kr.

Samlet har TRYGD forrentet sin egenkapital med omkring 11 % i 2008.

Ledelsen anser resultatet som tilfredsstillende. De gennemførte rationaliseringer, med lavere driftsomkostninger, har sammen med en stigning i præmieindtægterne, kompenseret for de betydelig højere skadeserstatningsudgifter i 2008.

De finansielle indtægter i 2008 var 6,5 mio.kr. imod 6,1 mio.kr. i 2007. Selskabet fører en forsigtig investeringspolitik, hvor størstedelen af den investerbare formue placeres i obligationer, og holdes som almindelige aftaleindlån. Der har ikke været investeret i aktier. Dette har vist sit værd i et stærkt faldende aktiemarked i 2008, med forholdsvis stabile finansielle indtægter.

Skat af årets resultat 2008 udgør 2,1 mio.kr.

## Overskudsdisponering

Bestyrelsen foreslår, at der udbetales 24,0 mio.kr. i udbytte til aktionæren, P/F Føroya Banki.

TRYGD udlodder således ud over årets overskud for 2008 på 9,4 mio.kr, også 14,6 mio.kr. af optjente frie reserver.

## Selskabets kapitalforhold

Ultimo 2008 andrager egenkapitalen 70,7 mio.kr., efter reservation af 24,0 mio.kr. til udbytte. Aktiekapitalen, der andrager 40 mio.kr., ejes i sin helhed af P/F Føroya Banki.

Reservefonden på 45 mio.kr. ultimo 2007, er omdannet til frie reserver i 2008. Dette er gjort med hjemmel i Aktieselskabsloven, der blev ændret i 2008.

## Forventninger til 2009

Ledelsen forventer et udfordrende år, uden væsentlig vækst i markedet for forsikringer. Samfundskonjunkturerne synes nedadgående, og en mulig vækst i præmieindtægterne skal baseres på videreudvikling af forsikringsmarkedet med nye produkter og erhvervelse af yderligere markedsandele.

Ledelsen forventer en omsætning i 2009 på omtrent samme niveau som for 2008. Indtægterne fra skibsforsikringerne vil udeblive, men tilsvarende stigning forventes fra andre produkter, samt afledt af de gennemførte prisforhøjelser.

Det er usikkert hvor mange nye udbydere der vil komme på det færøske forsikringsmarked det næste års tid, konjunkturerne taget i betragtning. Men den intense konkurrence mellem bestående udbydere på både priser og betingelser forventes af fortsætte.

TRYGD arbejder fokuseret på at forbedre forrentningen af selskabets egenkapital. Med grundlag i at de samlede forsikringsmæssige risici for egen regning er reduceret, og selskabets lønsomhed er forbedret, har bestyrelsen besluttet at selskabet tilpasser sit kapitalberedskab hertil, og udlodder i alt 24,0 mio. kr. i udbytte for 2008. En egenkapital på 70,7 mio.kr. ultimo 2008 anses som tilfredsstillende til TRYGD´s virksomhed i 2009.

# Nýttur roknskaparháttur

## Alment
Ársroknskapurin hjá TRYGD er gjørdur í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi og í samsvari við alment góðkendar roknskaparreglur.
Nýttur roknskaparháttur er óbroyttur í mun til undanfarna ár.

## Tryggingargjøld
Tryggingargjøld verða tíðaravmarkað, soleiðis at inntøkur verða tiknar við í tann mun, tær eru tengdar at roknskaparárinum.

## Latin endurtryggingargjøld
Tryggingargjøld til endurtryggingarfeløg verða tíðaravmarkað, soleiðis at útreiðslur verða tiknar við í tann mun, tær eru tengdar at roknskaparárinum.

## Endurgjøld/endurgjaldsburturleggingar
Endurgjaldsburturleggingar og áogn av skaðum, eru uppgjørd eftir einsæris metingum av hvørjum skaða sær, sum ikki er endaliga uppgjørdur. Íroknað endurgjaldsburturleggingar, er eisini ein eykaupphædd á 5% fyri hendar, men ikki fráboðaðar skaðar, og eitt eyka fríhald á 10% til óvæntaðar skaðaútreiðslur.

## Tryggingarteknisk renta
Tryggingartekniska rentan er roknað sum 4,59% av miðalstøddini á tryggingarburturleggingum fyri egna rokning.

## Endurtryggingarfulnaður
Gjøld frá endurtryggjaranum viðvíkjandi meldaðum skaðum verða tíðaravmarkað, soleiðis at hesi verða tikin við í tann mun, tey eru tengd at roknskaparárinum.

## Fastar ognir
P/F TRYGD eigur eini tvíhús, hvørs virði er ásett til marknarvirði.

## Lánsbrøv
Lánsbrævagoymsla felagsins er virðissett sambært almennum kursum við árslok.

## Innbúgv og rakstrartól
Innbúgv og rakstrartól felagsins eru bókað til keypsprís, frádrigið av- og niðurskrivingar. Ognirnar verða avskrivaðar liniert, grundað á ætlaða nýtslutíð eftir 3 til 5 ár.
Útveganir av rakstrargøgnum fyri undir 20 tkr. verða útreiðsluførdar.
Ritbúnaður (software) verður útreiðsluførdur í útveganarárinum.

## Skattur
Skattur er samansettur av skatti av skattsskyldugu inntøkuni fyri árið og javning av útsettum skatti. Skatturin av skattskyldugu inntøkuni í árinum verður útreiðsluførdur í rakstrarúrslitinum við 18%.
Útsetti skatturin verður avsettur við 18% av muninum millum roknskaparlig og skattlig virði á ogn og skuld.

## Handlar innan samtakið
Við handli millum feløg í samtakinum og millum samstarvsfyritøkur, eins og tá hesi gera arbeiðið hvørt fyri annað, verða avroknað sambært marknaðartreytum ella á einum útreiðslunøktandi grundarlagi.

# Anvendt regnskabspraksis

## Generelt
Årsregnskabet er udarbejdet i overensstemmelse med lov om forsikringsvirksomhed, samt almindelig anerkendt regnskabspraksis.
Anvendt regnskabspraksis er uændret i forhold til sidste år.

## Præmier/præmiehensættelser
Præmieindtægten periodiseres, således at indtægten svarer til regnskabsåret andel.

## Afgivne genforsikringspræmier
Præmier til ressurandører periodiseres, således at udgiften svarer til regnskabsårets andel.

## Erstatninger/erstatningshensættelser
Erstatningshensættelser og tilgodehavender vedrørende skader opgøres efter en individuel vurdering af hver uafsluttet skade. I erstatningshensættelserne indgår endvidere en reserve på 5% til indtrufne, men ikki anmeldte skader og en ekstra stødpudereserve på 10% til forudsete skadeudgifter.

## Forsikringsteknisk rente
Den forsikringstekniske rente bregnes som 4,59% af de gennemsnitlige forsikringsmæssige hensættelser for egne regning.

## Genforsikringsdækning
Reassurandørens andel af anmeldte skader periodiseres, således at indtægten svarer til regnskabsårets andel.

## Bygninger
TRYGD ejer 1 sammenbygget rækkehus, hvis værdi er ansat til markedsværdi.

## Værdipapirer
Selskabets obligationsbeholdning er optaget til den senest noterede officielle kurs.

## Inventar, edb anlæg, bil m.v.
Inventar, edb anlæg og selskabets biler er opført til anskaffelsessum, reguleret for af- og nedskrivninger. Der foretages liniære afskrivninger baseret på aktivernes forventede driftsøkonomiske levetid på mellem 3 og 5 år. Anskaffelse af driftsmateriel under 20 tkr. udgiftsføres.
Software udgiftsføres i anskaffelsesåret.

## Skat
Årets skatteudgift omfatter skat af årets skattepligtige indkomst samt regulering af udskudt skat.
Skat af årets skattepligtige indkomst udgiftsføres i resultatopgørelse med 18%.
Udskudt skat hensættes efter den balanceorienterede gældsmetode med 18% af midlertidige forskelle mellem regnskabs- og skattemæssige værdier af aktiver og passiver.

## Koncerninterne transaktioner
Transaktioner mellem koncernes selskaber og associerede virksomheder afregnes på markedsbaserede vilkår eller på omkostningsdækkede basis.

# Gongdin seinastu 5 árini / udviklingen de sidste 5 år

## Høvuðstøl / Hovedtal

| DKK 1.000 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tryggingargjøld f.e.r / Præmieindtægter f.e.r. | 41.576 | 49.720 | 57.870 | 65.207 | 74.107 |
| Skaðagjøld f.e.r / Erstatningsudgifter f.e.r. | -28.601 | -35.823 | -33.654 | -36.054 | -50.255 |
| Rakstrarútreiðslur av trygging f.e.r. / Forsikringsmæssige driftsomkostninger f.e.r. | -12.127 | -15.813 | -21.030 | -26.824 | -18.881 |
| Tryggingartekniskt úrslit / Forsikringsteknisk resultat | 1.449 | -1.145 | 4.532 | 4.226 | 7.204 |
| Úrslit av íløguvirksemi / Resultat af invest. virksomhed | 3.158 | 3.306 | 2.435 | 4.211 | 4.246 |
| Ársúrslit / Årets resultat | 3.694 | 1.720 | 5.706 | 6.918 | 9.385 |
| Tryggingarligar burturleggingar / Forsikringsmæssige hensættelser f.e.r. | 24.847 | 36.858 | 39.485 | 36.336 | 44.795 |
| Eginpeningur / Egenkapital | 119.999 | 121.719 | 97.425 | 85.343 | 70.728 |
| Ognir tilsamans / Aktiver i alt | 157.017 | 173.551 | 183.080 | 158.483 | 161.496 |

# Rakstrarúrslit / Resultatopgørelse

| | DKK 1.000 | 2008 | 2007 |
|---|---|---|---|
| | Tryggingargjøld, brutto / Bruttopræmier | 90.660 | 81.548 |
| | Latin endurtryggingargjøld / Afgivne genforsikringspræmier | -12.342 | -13.368 |
| | Broyting í avsetingum til tryggingargjøld / Ændring i bruttopræmiehensættelser | -4.033 | -3.250 |
| | Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til tryggingargjøld / Ændring i genforsikringsandel af præmiehensættelser | -178 | 277 |
| | Tryggingargjøld f.e.r. / Præmieindtægter f.e.r. | 74.107 | 65.207 |
| 1 | Tryggingarteknisk renta f.e.r. / Forsikringsteknisk rente f.e.r. | 2.233 | 1.897 |
| | Útgoldin skaðagjøld, brutto / Udbetalte bruttoerstatninger | -55.806 | -46.342 |
| | Endurgoldið frá endurtryggingingini / Modtaget genforsikringsdækning | 9.798 | 4.166 |
| | Broyting í avsetingum til skaðagjøld / Ændring i bruttoerstatningshensættelser | -5.805 | 6.878 |
| | Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til skaðagjøld / Ændring i genforsikringsandel af erstatningshensættelser | 1.558 | -756 |
| | Skaðagjøld f.e.r. / Erstatningsudgifter f.e.r. | -50.255 | -36.054 |
| 2,6,7 | Fyrisitingarútreiðslur / Administrationsomkostninger | -20.357 | -27.023 |
| | Tekningarútreiðslur / Erhvervelsesomkostninger | -703 | -614 |
| | Provisiónir frá endurtryggingum / Provisioner fra genforsikringsselskaber | 2.179 | 813 |
| | Rakstrarútreiðslur av trygging f.e.r / Forsikringsmæssige driftsomkostninger f.e.r. | -18.881 | -26.824 |
| | Tryggingartekniskt úrslit / Forsikringsteknisk resultat | 7.204 | 4.226 |
| | Inntøkur av fastari ogn / Indtægter af fast ejendom | -37 | -38 |
| 3 | Rentur og vinningsbýti v.m. / Renter og udbytter m.v. | 6.317 | 7.045 |
| 4 | Virðisjavnan av íløguognum / Kursreguleringer af investeringsaktiver | 199 | -899 |
| | Inntøkur av íløguognum / Indtægter af investeringsaktiver | 6.479 | 6.108 |
| | Flutt til tryggingartekniska rentu / Overført til forsikringsteknisk rente | -2.233 | -1.897 |
| | Úrslit av íløguvirksemi / Resultat af investeringsvirksomhed | 4.246 | 4.211 |
| | Úrslit undan skatti / Ordinært resultat før skat | 11.450 | 8.437 |
| 5 | Skattir / Skatter | -2.065 | -1.519 |
| | Ársúrslit / Årets resultat | 9.385 | 6.918 |
| | Býti av rakstrarúrsliti / Fordeling af resultat | 9.385 | 6.918 |
| | Flutt frá yvirkursgrunni / Overført fra overkursfond | 44.975 | 0 |
| | Flutt frá undanfarnum árum / Overført fra tidligere år | 368 | 12.450 |
| | Tøkar / Til disposition | 54.728 | 19.368 |
| | Nýtt til vinningsbýti / Anvendt til udbytte | 24.000 | 19.000 |
| | Framflutt úrslit / Overført resultat | 30.728 | 368 |
| | Tilsamans / I alt | 30.728 | 368 |

# Fíggjarstøða 31. Desember / Balance pr. 31. December

| Note | DKK 1.000 | 2008 | 2007 |
|---|---|---|---|
| | **Ogn / Aktiver** | | |
| 8 | Fastar ognir / Faste ejendomme | 980 | 980 |
| 10 | Lánsbrøv / Obligationer | 46.213 | 46.057 |
| | **Íløguognir / Investeringsaktiver** | 47.193 | 47.037 |
| 11 | Áogn hjá tryggingartakarum / Tilgodehavende hos forsikringstagere | 17.841 | 12.801 |
| 12 | Áogn hjá tryggingarfeløgum / Tilgodehavende hos forsikringsselskaber | 2.596 | 0 |
| 13 | Onnur áogn / Andre tilgodehavender | 251 | 296 |
| | **Áogn / Tilgodehavende** | 20.688 | 13.097 |
| 9 | Edv, innbúgv, bilar o.a. / Edb, inventar, biler m.v. | 709 | 263 |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn / Kassebeholdning og anfordringstilgodehavender | 91.042 | 95.314 |
| | **Aðrar ognir / Andre aktiver** | 91.751 | 95.577 |
| | **Tíðaravmarkingar / Periodeafgrænsningsposter** | 1.864 | 2.772 |
| | **Ognir tilsamans / Aktiver i alt** | 161.496 | 158.483 |
| | **Skuld / Passiver** | | |
| | Partapeningur / Aktiekapital | 40.000 | 40.000 |
| | Yvirkursgrunnur / Overkursfond | 0 | 44.975 |
| | Framflutt úrslit / Overført resultat | 30.728 | 368 |
| 14 | **Eginpeningur / Egenkapital** | 70.728 | 85.343 |
| | Avsett til tryggingargjøld, brutto / Bruttopræmiehensættelser | 24.461 | 20.428 |
| | Partur hjá endurtryggingini / Genforsikringsandel | -294 | -472 |
| 15 | **Avsett til tryggingargjøld f.e.r. / Præmiehensættelser f.e.r.** | 24.167 | 19.956 |
| | Avsett til skaðagjøld, brutto / Erstatningshensættelser, brutto | 22.855 | 17.050 |
| | Partur hjá endurtryggingini / Genforsikringsandel | -2.227 | -670 |
| | **Avsett til skaðagjøld f.e.r. / Erstatningshensættelser f.e.r.** | 20.628 | 16.380 |
| | **Aðrar avsetingar / Andre hensættelser** | 0 | 0 |
| 16 | Skuld í samband við endurtrygging / Gæld i forbindelse med genforsikring | 1.458 | 1.025 |
| | Partafelagsskattur / Selskabsskat | 2.020 | 1.766 |
| | Onnur skuld / Anden gæld | 3.355 | 3.767 |
| | Vinningsbýti fyri roknskaparárið / Udbytte for regnskabsåret | 24.000 | 19.000 |
| | **Skuld / Gæld** | 30.833 | 25.558 |
| 17 | **Tíðaravmarkingar / Periodeafgrænsningsposter** | 15.140 | 11.246 |
| | **Skuld tilsamans / Passiver i alt** | 161.496 | 158.483 |

# Viðmerkingar til ársroknskapin / Noter til årsregnskabet

| | DKK 1.000 | 2008 | 2007 |
|---|---|---|---|
| 1 | **Tryggingarteknisk renta / Forsikringsteknisk rente** | | |
| | Tryggingarteknisk renta er roknað sum 4,59 % av miðal burturleggingum fyri tryggingarvirksemi f.e.r. / Forsikringsteknisk rente er beregnet som 4,59 % af de gennemsnitlige forsikringsmæssige hensættelser f.e.r. | | |
| 2 | **Fyrisitingarútreiðslur / Administrationsomkostninger** | | |
| | Í upphæddini eru íroknaðar hesar avskrivingar / I beløbet indgår følgende afskrivninger: | | |
| | Maskinur og innbúgv / Maskiner og inventar | 99 | 71 |
| | Bilar / Biler | 142 | 222 |
| | Fastogn / Fast ejendom | 0 | 0 |
| | Tilsamans / I alt | 241 | 293 |
| 3 | **Rentur og vinningsbýti / Renter og udbytte m.v.** | | |
| | Renta av lánsbrøvum / Renter af værdipapirer | 2.055 | 3.113 |
| | Renta av innlánum / Renter af indlån | 4.262 | 3.932 |
| | Vinningsbýti av partabrøvum / Udbytte af aktier | 0 | 0 |
| | Tilsamans / I alt | 6.317 | 7.045 |
| 4 | **Virðisjavnan av íløguognum / Kursreguleringer af investeringsaktiver** | | |
| | Virðisjavnan av íløguognum / Kursreguleringer af investeringsaktiver | 199 | -899 |
| | Tilsamans / I alt | 199 | -899 |
| 5 | **Skattur / Skat** | | |
| | Skattur av skattskyldugari inntøku / Skat af skattepligtig indkomst | 2.020 | 1.766 |
| | Javnan av útsettum skatti viðvíkjandi ársúrslitinum / Regulering af udskudt skat vedrørende årets resultat | 45 | -247 |
| | Tilsamans / I alt | 2.065 | 1.519 |
| 6 | **Leiðslu- og starvsfólkaviðurskifti / Ledelses- og medarbejderforhold** | | |
| | Umroknað til fulla tíð hava í miðal starvast 27 fólk í felagnum í roknskaparárinum / Omregnet til fuldtidsansatte har der i gennemsnit i regnskabsåret været ansat 27 personer. | | |
| | Útreiðslurnar til lønir, eftirlønir o.a. kunnu sundurgreinast soleiðis / Den samlede udgift til lønninger, pensioner m.v. udgør til: | | |
| | Nevnd / Bestyrelse | 154 | 144 |
| | Stjórn / Direktion | 1.175 | 2.204 |
| | Fyri onnur starvsfólk er upphæddin / For øvrige medarbejdere udgør beløbet: | | |
| | Lønir / Lønninger | 9.145 | 11.617 |
| | Eftirlønir / Pensioner | 842 | 880 |
| | Sosialar útreiðslur / Social sikring | 860 | 1.057 |
| 7 | **Gjald til grannskoðarar / Revisionshonorar** | | |
| | Gjald til lógásetta grannskoðan / Honorar for lovpligtig revision | 188 | 163 |
| | Aðrar veitingar / Andre ydelser | 0 | 0 |

# Viðmerkingar til ársroknskapin / Noter til årsregnskabet

| | DKK 1.000 | 2008 | 2007 |
|---|---|---|---|
| 8 | Fastar ognir / Faste ejendomme | | |
| | Útveganarvirði / Anskaffelsespris | 980 | 980 |
| | Tilgongd / Tilgang | 0 | 0 |
| | Frágongd / Afgang | 0 | 0 |
| | Avskriving undanfarin ár / Tidligere års afskrivning | 0 | 0 |
| | Avskrivingar í árinum /Årets afskrivning | 0 | 0 |
| | Bókað virði 31.12 / Bogført værdi 31.12 | 980 | 980 |
| 9 | Edv, innbúgv og bilar o.a. / Edb, inventar og biler m.v. | | |
| | Útveganarvirði / Anskaffelsespris | 2.119 | 2.119 |
| | Tilgongd / Tilgang | 903 | 0 |
| | Frágongd / Afgang | 216 | 0 |
| | | 2.806 | 2.119 |
| | Avskriving undanfarin ár / Tidligere års afskrivning | 1.856 | 1.563 |
| | Avskrivingar í árinum / Årets afskrivning | 241 | 293 |
| | | 2.097 | 1.856 |
| | Bókað virði 31.12 / Bogført værdi 31.12 | 709 | 263 |
| | Harumframt er avskrivað beinleiðis í rakstri / Årets straksafskrivninger | 2.721 | 1.902 |
| 10 | Lánsbrøv / Obligationer | | |
| | Kursvirði við ársbyrjan / Kursværdi primo | 46.057 | 52.163 |
| | Kursvirði við árs enda / Kursværdi ultimo | 46.213 | 46.057 |
| 11 | Áogn hjá tryggingartakarum / Tilgodehavender hos forsikringstagere | | |
| | Eftirstøður / Præmierestancer | 3.872 | 3.296 |
| | Frammanundan uppkravt / Forudfaktoreret | 13.970 | 9.505 |
| | Tilsamans / I alt | 17.841 | 12.801 |
| 12 | Áogn hjá tryggingarfeløgum / Tilgodehavender hos forsikringsselskaber | | |
| | Endurtryggingarpartur av skaðagjøldum / Genforsikringens andel af udbetalte erstatninger | 1.596 | 0 |
| | Endurtryggingarprovisión tilgóðar / Tilgodehavende genforsikringsprovision | 1.000 | 0 |
| | Tilsamans / I alt | 2.596 | 0 |
| 13 | Onnur áogn / andre tilgodehavender | | |
| | Postverk Føroya / Postverk Føroya | 7 | 7 |
| | Skattaogn (støðisogn) / Skatteaktiver (anlægsaktiver) | 244 | 289 |
| | Tilsamans / I alt | 251 | 296 |

# Viðmerkingar til ársroknskapin / Noter til årsregnskabet

14 **Eginpeningur / Egenkapital**

| | Parta-peningur / Aktiekapital | Yvirkurs grunnur/ Overk.fond | Fluttur vinn-ingur / Over-ført resultat |
|---|---|---|---|
| Ársbyrjan 2008 / Primo 2008 | 40.000 | | |
| Yvirkursgrunnur / Overkursfond | | 44.975 | |
| Flutt frá yvirkursgrunni / Overført fra overkursfond | | -44.975 | 44.975 |
| Ársúrslit / Årets resultat | | | 9.385 |
| Fluttur vinningur / Overførte resultater | | | 368 |
| Vinningsbýti / Udbytte | | | -24.000 |
| **Árslok 2008 / Ultimo 2008** | **40.000** | **0** | **30.728** |

Eginpeningurin er grundkapitalurin í felagnum.
Solvensmarginin, ið er lógarinnar minstakrav til grundkapitalin, er við árs enda tkr. 23.842
Grundkapitalurin er 296 % av solvensmargin /
Egenkapitalen er selskabets basiskapital.
Selskabets solvensmargin, der er lovgivningens minimumskrav til basiskapitalen, udgør ved regnskabsårets afslutning tkr. 23.842

Basiskapitalen udgør 296 % af solvensmargin.

15 **Avsett til tryggingarvirksemi f.e.r. / Forsikringsmæssige hensættelser f.e.r.**
Tryggingar felagsins, tó tryggingar hjá størri skipum undantikið, hava leypandi høvuðsforfall, sum inniber, at tær einstøku tryggingarnar hvør einsæris hava gjaldingardag tann 1. í mánaðinum.
Tryggingargjaldið verður antin goldið kvartárliga, hálvárliga ella árliga.
Tryggingarnar hjá størri skipum hava allar høvuðsforfall tann 1. januar, og tryggingargjaldið fyri hesar verður goldið kvartárliga. Inntøkan er samsvarandi tíðaravmarkað. /
Selskabets forsikringer, bortset fra forsikringer for større skibe, har løbende hovedforfald, hvilket indebærer, at de enkelte forsikringer vil have betalingsdato individuelt den 1. i en måned.
Præmien betales enten kvartalsvis, halvårsvis eller helårligt. Selskabets forsikringsportefølje for større skibe har hovedforfald til 1. januar, og præmien for disse forsikringer betales kvartalsvis. Præmieindtægten er periodiseret tilsvarende.

| | 2008 | 2007 |
|---|---|---|
| 16 **Skuld í samband við endurtrygging / Gæld i forbindelse med genforsikring** | | |
| Upphæddin er millumrokning við endurtryggingarfeløg / Beløbet udgør mellemværender med genforsikringsselskaber. | 1.458 | 1.025 |

17 **Tíðaravmarkingar / Periodeafgrænsningsposter**
Í upphæddini eru goldin ikki fallin tryggingargjøld /
Beløbet omfatter betalte endnu ikke forfaldne præmier

# Átekning / Påtegninger

Ársroknskapurin verður lagdur fyri aðalfundin við tilmæli um góðkenning /

*Årsregnskabet indstilles til generalforsamlingens godkendelse.*

Tórshavn, tann 27. februar 2009 / Tórshavn, den 27. februar 2009

**Stjórnin / Direktionen**

Jean Djurhuus

**Nevndin / Bestyrelsen**

Janus Petersen
Formaður / *Formand*

Súni Schwartz Jacobsen

Christian Andreasen

Niels Juul Andersen

Tummas Hanus Dam

Hesin roknskapur er soleiðis samtyktur á ársaðalfundi í P/F TRYGD tann 27. februar 2009

*Dette regnskab er således godkendt på generalforsamlingen i P/F TRYGD den 27. februar 2009*

Fundarstjóri / Dirigent
Christian Andreasen

# Grannskoðaraátekningar

Ársroknskapurin fyri 2008 fyri P/F TRYGD er grannskoðaður av innanhýsis grannskoðanini í P/F FØROYA BANKA.

*Årsregnskabet for 2008 for P/F TRYGD er revideret af den interne revision i P/F FØROYA BANKA.*

Tórshavn, tann 27. februar 2009 / *Tórshavn , den 27. februar 2009*

Petur A. Johannesen

Grannskoðanarleiðari / *Revisionschef*

Vit hava grannskoðað tann av leiðsluni gjørda ársroknskap fyri 2008 fyri P/F TRYGD.

## Framda grannskoðanin

Vit hava fyrireikað og framt grannskoðanina í samsvari við vanliga góðkendar grannskoðanarreglur við atliti til at fáa eina grundaða sannføring um, at ársroknskapurin ikki inniheldur týðandi feilir ella manglar. Út frá eini meting um týdning og vanda hava vit undir grannskoðanini eftirkannað grundarlagið og skjalaprógvið undir teimum í roknskapinum uppsettu upphæddum og upplýsingum annars. Í hesi hava vit tikið støðu til nýttu roknskaparreglurnar og roknskaparligu metingarnar og hava mett, um upplýsingarnar í ársroknskapinum sum heild eru nøktandi.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Okkara fatan er, at ársroknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við krøvini í løggávuni um roknskaparframløgu, og at ársroknskapurin hevur eina rættvísandi mynd av ogn, eginpeningi, burturleggingum og skuld felagsins, tí fíggjarligu støðuni og úrslitinum.

Vi har revideret det af ledelsen aflagde årsregnskab for 2008 for P/F TRYGD.

## Den udførte revision

Vi har tilrettelagt og udført revisionen i overensstemmelse med almindeligt anerkendte revisionsprincipper med henblik på at opnå en begrundet overbevisining om, at årsregnskabet er uden væsentlige fejl eller mangler. Under revisionen har vi ud fra en vurdering af væsentlighed og risiko efterprøvet grundlaget og dokumentationen for de i årsregnskabet anførte beløb og øvrige oplysninger. Vi har herunder taget stilling til den anvendte regnskabspraksis og de regnskabsmæssige skøn samt vurderet, om årsregnskabets informationer som helhed er fyldestgørende.

Revisionen har ikke givet anledning til forbehold.

## Konklusion

Det er vor opfattelse, at årsregnskabet er aflagt i overensstemmelse med lovgivningens krav til regnskabsaflæggelsen, og at det giver et retvisende billede af selskabets aktiver og passiver, økonomiske stilling samt resultat.

Tórshavn, tann 27. februar 2009 / *Tórshavn, den 27. februar 2009*

**SPEKT**
Løggildir grannskoðarar, Sp/f

Finnbjørn Zachariasen
statsaut. revisor

Jákupa Mikkelsen
cand. merc. aud.

**Rasmussen & Weihe, P/F**
Løggilt grannskoðanarvirkið, P/F

Ole Guldborg Nielsen
løggildur grannskoðari

TRYGD

hugsar um teg.